# Kjak



Bjørt Samuelsen
*løgtingskvinna*

## Húsakeyp og væntandi lóggáva

At keypa eini hús ella íbúð er hjá flestum okkara størsta fíggjarliga íløgan vit gera í lívinum. Í sendingini Skannarin hoyrdu vit um staka mammu, sum var komin sera illa fyri, tá hon keypti hús, og um hvussu átrokandi tað er at fáa lóggávu, sum skipar keyp og sølu av fastari ogn.

Rættarhjálpin viðgerð á hvørjum ári á leið 50 mál, ið snúgva seg um keyp og sølu av fastari ogn. Og hetta er øðiliga nógv, hugsa vit um avmarkaðu støddina á føroyska húsamarknaðinum.

Í fjør vár legði Tjóðveldi saman við Sjálvstýrinum fram uppskot til samtyktar at fáa landsstýrið sum skjótast at smíða og leggja fyri tingið alla neyðuga lóggávu kring keyp og sølu av fastari ogn og húsameklaravirksemi.

Slík lóggáva skal lýsa øll rættindi og allar skyldur hjá seljara, og skal soleiðis verja keyparar, so teir ikki koma út í slíkar støður, sum ræðusøguna vit hoyrdu um í Skannaranum. Lógin skal eisini staðfesta, hvørjar skyldur liggja á keyparanum sjálvum.

### Følsk trygd

Húsakeyp fara sum kunnugt í alsamt størri mun fram ígjøgnum meklarafyritøkur. Hetta átti at borga fyri størri brúkaratrygd, men ger tað ikki vegna væntandi lógarkrøv. Tvørturímóti kann keyparin fáa falska trygd, eitt nú við at hann fær ta fatan, at støðulýsing er gjørd av ognini, hóast lýsingin bert byggir á upplýsingar frá seljaranum sjálvum. Slíkar støðulýsingar kunnu vera verri enn einki. Til ber vanliga at keypa meira fakliga grundaðar støðulýsingar av ognini, men greið krøv eru heldur ikki til hesar støðulýsingar og ógreitt er, hvør ábyrgd fylgir slíkari.

Við lógini um fastognarkeyp kann verða ásett krav um trygging. Tað ber í sær, at seljari hjá einum tryggingarfelag stovnar trygging uppá, at húsini eru í einum ávísum standi. Tryggingarfelagið fer tá at seta ítøkilig krøv til støðulýsingarnar. Og sum vit vístu á í viðmerkingunum til okkara uppskot, so er keyp og søla av fastari ogn og meklaravirksemi væl skipað í okkara grannalondum. Tí átti at borið til væl og kvikliga at smíða líknandi føroyska lóggávu.

### Væl móttikið

Málið fekk eina sera góða viðgerð í Vinnunevndini. Uttan undantak vístu øll, sum komu í nevndina á, at hetta var sera harðliga tiltrongd lóggáva, og tey fegnaðust um, at málið var komið til viðgerðar í Løgtinginum. Kortini valdi samgongan at fella hetta andstøðuuppskot. Helst tí at landsstýrismaðurin segði, at hann var farin undir slíka lóggávu og fór at koma við lógunum sama heyst. Hetta frøddust vit sjálvandi um, men eru farin at ótolnast, nú skjótt eitt ár er runnið. Vónandi kann tað fokus, sum Skannarin hevur sett á málið, fáa ferð á, so lógin loksins kemur fyri tingið.

---



Bergtóra Høgnadóttir
Joensen

## Sjúkradagpeningur – eitt alneyðugt fokus

Gleðiligt, at Kringvarpið varpar ljós á fylgjur hins sjúka, starvsfelagar, arbeiðsgevarar og samfelagið tá fólk eru langtíðarsjúk. Gott, at til ber at fáa løn undir sjúku hjá mongum og at sjúkradagpeningur er ein møguleiki í 9 mánaðar. Vansir eru tó sanniliga eisnini við verandi skipan. Tí tíverri hava vit eina skipan, har einki krav er um uppfylging.

### Uppfylging? Hvat er tað?

Tað almenna rindar sjúkradagpening til fólk í 9 mánaðar uttan at spyrja fólk um, hvussu tey hava tað, um ávísar arbeiðsuppgávur eru tey megna hóast sjúku, um tey megna at arbeiða nakrar tímar, hóast tey ikki megna fulltíðarstarv ella sum skjótast at veita fólki endurbúgving ella hjálp til aðra starvsleið, um tað er einasta loysnin. Ella er tað arbeiðsumhvørvið sum er púra sjúkt á arbeiðsplássinum? Alt hetta er upplagt at spyrja um og práta um - tá krav er um lógarfesta uppfylging.

Er talan um arbeiðsumhvørvið kann eitt Arbeiðseftirlit eisini bøta um tað, um normeringin er nóg góð. Bæði tá talan er um fysiskt og psykiskt arbeiðsumhvørvi.

Haldi tað vera øðiliga óheppi og beinleiðis skaðiligt, at einki krav eru um uppfylging í verandi løtu. Sjálv havi eg í grannalandi havt gleðina av at hjálpa og stuðla fólkum sum vóru sjúk, út á arbeiðsmarknaðin aftur. Og tað besta var, at í mongum førum skuldi avbera lítið til, so megnaðu fólk aftur arbeiðslívið aftur. Hinum sjúka, arbeiðsplássinum og samfelagnum til gagns. Ein tummilfingurregla er eisini, at jú fyrr fylgt verður upp, tess fyrr kunnu fólk fara aftur til arbeiðis – tess bíligari fyri allar partar. Meg minnist eina kanning um aldarskiftið sum vísti, at um fólk høvdu verið burtur frá arbeiðsmarknaðinum vegna sjúku í eitt ár, kom bert ein av 10 út á arbeiðsmarknaðin aftur. Lat meg nevna nækur dømi um, hvønn mun uppfylging kann gera:

### Dømi 1:

Kvinna sum hevði tunglyndi og ongantíð væntaði, at fáa arbeiðsførleikan aftur. Hon byrjaði í smáum nakrar tímar um dagin og slapp undan uppgávunum, sum hon helt vera allarmest krevjandi. Hon, álitisfólk hennara, leiðarin og eg, sum umboðaði tað almenna høvdu regluglig prát á arbeiðsplássinum – tríggjar mánaðar seinni megnaði hon aftur at arbeiða fulla tíð.

### Dømi 2:

Maður sum var elektirikari, í 50'unum og knøini vóru niðurslitin. Amboðini vóru tung og nógvar trappur vóru í økinum, har hann arbeiddi. Tískil sjúkrameldaður. Saman við álitisfólkinum og leiðaranum komu vit ásamt um, at hann skuldi royna bert at hava uppgávur har ongar trappur vóru. Hann arbeiddi tískil bert í einum øki har eingi háhús vóru og hann fekk arbeiðsamboð, sum vóru úr serliga løttum tilfari….og hann helt á at arbeiða fulla tíð. Skjóta uppfylgingin gjørdi allan munin.

### Dømi 3:

Fekk samband við arbeiðsleysa kvinnu sum segði soleiðis: fyrr bagdi høvdinum einki, hevði diskusprolaps og fekk tí ikki arbeitt. Nú havi eg tað fínt í rygginum, men havi mist arbeiðið…og í høvdinum haldi eg nú ikki at eg kann brúkast til nakað. Tí er vorðið so trupult hjá mær at fáa starv. Sjálvsálitið er horvið!

### Vitleyst

Tykist vitleyst, at hava eina skipan, sum bara veitir fólki pening, men ikki veitir fólki hjálp, so tey skjótast gjørligt aftur eru før at arbeiða. Vit eiga sjálvsagt at fylgja upp og spyrja fólk um, hvussu heilsustøðan ávirkar arbeiðslívið – og um tey megna nakað, hóast tey ikki megna at arbeiða fulla tíð.

### Ábyrgd

Hvørs ábyrgd er tað, at fólk skjótast gjørligt aftur eru arbeiðsfør? Mín sannføring at tað eru arbeiðsgevarin, tað almenna, hin sjúki og yrkisfelagið. Aðrastaðani verður hugtakið sosial ábyrgd á arbeiðsplássinum nógv nýtt. Tað merkir bæði at rúm eisini eigur at vera fyri teimum sum hava skerdan førleika ella eru sjúk.

### Starvsfólkanormeringar

At broyta lógina er fyrsta stigið, harumframt er avgerandi neyðugt at uppnormera, so tey sum hava við sjúkradagpeningamál at gera eru væl ílatin til truplu samrøðuna og at málsnøgdin er hóskilig, so tey hava møguleika at gera munagott sosialt arbeiði.

### Tjóðveldi og uppfylging

Tjóðveldi varpar áhaldandi ljós á hetta øki í kjaki, greinum og fyrispurningum. Júst nú eru vit við í einum arbeiðsbólki undir almannamálaráðnum, har vit sjálvandi eisini royna sum best at gera okkara ávirkan galdandi í hesum álvarsmáli.